ítróttur

Nr. 3 • mikudagur • 4. januar 2006 • 80. árgangur • www.sosialurin.fo

# Hvør er bestur innandura?




*Landsliðsleikarin Jákup á Borg skipar seinni í hesum mánaðinum fyri óalmennum FM í innandura fótbólti. Kappingin verður í Hoyvíkshøllini 21. januar, og væntandi fara umleið 18 feløg at taka lut. Tey bæði fremstu liðini vinna gávukekk frá Føroya Banka, og peningurin skal nýtast til ungdómsarbeiðið í viðkomandi feløgum.*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Seinni í hesum mánaðinum fara flestøll fótbóltsfeløg í landinum at kappast um óalmenna FM-heitið í innandura fótbólti. Vinnandi felagið fær stóra peningaupphædd, sum skal nýtast til ungdómsarbeiði í felagnum**

INNANDURA FÓTBÓLTUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Tað er landsliðsleikarin Jákup á Borg, sum skipar fyri kappingini, ið verður leikt í Hoyvíkshøllini leygardagin tann 21. januar. Jákup hevur arbeitt við kappingini í drúgva tíð, og tað hevur eydnast honum at fáa Føroya Banka at verða høvuðsstuðul, og tað er bankin, sum letur peningaupphædd til tey bæði fremstu feløgini.

Spurdur, hvussu tað ber til, at hann nú einsamallur tekur stig at skipa fyri einum slíkum óalmennum FM í innandura fótbólti, sigur Jákup á Borg.

– Tað hevur verið skipað fyri slíkari kapping í Vági í fleiri ár, men glansurin er so líðandi farin av kappingin har suðuri, og leikararnir hava seinnu árini ikki tikið kappingina í álvara, og tað helt eg verða spell. Eg vóni og vænti, at henda kappingin, sum eg nú havi tikið stig til, fer at hava áhuga millum leikararnar, og at teir fara at taka hana í stórum álvara, sigur hann.

## Eitt lið frá hvørjum felag

Jákup á Borg sigur, at væntandi verða tað eini 18 feløg, sum fara at taka lut í kappingini, og hvørt felag kann luttaka við einum liði.

Kappingin er skipað á tann hátt, at hvørt lið kann hava fimm mans á vøllinum í senn, og ein teirra skal verða málverji. Hóast liðini hava málverja, so verða tað tey smáu innandura málini, ið verða nýtt í kappingini.

– Hóast liðini bert kunnu hava fimm mans á vøllinum í senn, so er tað mín ætlan, at hvørt felag kann hava átta leikarar við til kappingina, greiðir Jákup á Borg frá.

## Drúgv kapping

Ætlanin er at skipa kappingina soleiðis, at fyrst verða leiktir fýra innleiðandi bólkar við ávíkavíst fýra og fimm liðum í hvørjum bólki. Tá ið hesir bólkar eru spældir, koma tvey tey fremstu liðini í hvørjum bólki víðari í kappingini.

Hesi átta liðini, sum á henda hátt spæla seg víðari, verða so býtt upp í tveir millumrundubólkar við fýra liðum í hvørjum, og tvey tey fremstu liðini í báðum hesum bólkum koma víðari í hálvfinaluna. Bæði í innleiðandi bólkunum og í millumrundubólkunum verða dystirnir seks minuttir til longdar.

Tá ið komið er til tey seinastu fýra liðini í kappingini, sum fara at dystast í hálvfinaluni, verða dystirnir eitt sindur drúgvari. Jákup á Borg sigur, at helst verða teir seinastu avgerandi dystirnir átta minuttir til longdar.

Tá ið vinnandi liðið er funnið, verða steyp og heiðursmerki handað, og sum áðurnevnt fær vinnandi liðið eisini ein gávukekk handaðan. Somuleiðis fær næstfremsta liðið ein gávukekk, sum tó er nakað minni enn tann hjá vinnandi liðnum.

– Umframt heiður til fremstu liðini, so fær toppskjúttin í kappingini eisini eitt steyp. Eisini skal besti leikari í kappingini kjósast, og tað verða umboð fyri ítróttarmiðlarnar, ið saman við øðrum finna henda leikaran, sigur Jákup á Borg.

Dómarar í óalmenna FM-kappingini í innandura fótbólti verða teir somu, ið til dagligt døma í heimligu fótbóltskappingini, so leikararnir kunnu kenna seg tryggar í, at tað verður hildið eitt vakið eyga við, hvussu leikur fer.

## Eisini sosialt tiltak

Tá ið sjálv kappingin er av, verður skipað fyri einum sosialum tiltaki, har leikararnir savnast til ein betri bita og hugna sær saman.

– Vit spæla móti hvørjum øðrum fleiri ferðir um árið, men kennast mest frá sjálvum vøllinum. Tað er tí eisini hugaligt, at vit kunnu savnast á ein eitt sindur øðrvísi hátt, sigur Jákup á Borg.

Hóast liðið hjá Jákupi sjálvum, HB, verður við í kappingini, so verður landsliðsleikarin sjálvur ikki millum leikararnar í kappingini.

– Tá ið eg nú skipi fyri sjálvari kappingini, so noyðist eg fyrst og fremst at hugsa um tað. Tí velji eg fyrst og fremst at verða á síðulinjuni og ansa eftir, at alt gongur, sum tað skal. Eg ivist tó ikki í, at HB-liðið verður eins sterkt, sjálvt um eg ikki eri við, sigur Jákup á Borg.

## Avboð til steypafinaluna

**Rúni Weihe gjørdist beint fyri nýggjár pápi. Tað hevur við sær, at hann ikki verður partur av Tromsø-liðnum, sum um vikuskiftið skal spæla steypafinalu**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Fyri aðru ferð í trý ár hevur Tromsø møguleika at gerast norskur steypavinnari í flogbólti. Leygardagin skulu í Oslo spæla finaludyst móti Nyborg úr Bergen.

Í Tromsø verður sagt, at tey ætla sær at leggja nógv fyri í fyrireikingunum. Millum annað verður farið til Oslo longu hósdagin, men tað stendur tó greitt, at hetta verður uttan Rúna Weihe.

Føroyski spælarin hevur annars verið eitt av álitunum hjá Tromsø í trý kappingarár, men hesa ferð gera kringstøðurnar til finaludystin, at hann ikki er tøkur.

Fáar tímar áðrenn 2006 varð skotið inn, gjørdist Rúni nevnliga pápi á fyrsta sinni. Sjálvur hevði hann sagt felagnum, at um hetta ikki var hent undan finaluni, so kom hann so ikki við, og nú heldur hann, at tíðarbilið til finaluna er ov stutt.

- Nú gekk alt væl, men talan var um tungan barnsburð. Tí havi eg ikki samvitsku at fara heimanífrá í tríggjar dagar longu nú, sigur Rúni við lokala blaðið, Nordlys.

Men føroyski spælarin leggur tó afturat, at hann framvegis heldur Tromsø hava góðar møguleikar í finaluni.

- Spæla allir upp til sítt besta, so ivist eg ikki í, at liðið hevur góðan møguleika, sigur Rúni við blaðið.

Heilt uttan føroyskt ískoyti verður Tromsø tó ikki. Bárður B. Mikkelsen er enn partur av hópinum hjá liðnum, sum eisini hevur Magnus Aðalsteinsson sum venjara. Sami Magnus er eisini venjari hjá føroyska flogbóltslandsliðnum, og tí er framvegis sannlíkt, at nógvir føroyingar fylgja við, tá NRK kl. 14.45 leygardagin sendir beinleiðis frá finaludystinum.